# Ársfrágreiðing 2025/2026

**Góðu limir,**

Hjartaliga vælkomin til aðalfund hjá Diabetesfelagnum.

Eg havi nú verið forkvinna í eitt ár, og hetta er mín fyrsta ársfrágreiðing og fyrsti aðalfundur í hesum leikluti. Tað hevur verið eitt læruríkt og spennandi ár, og eg haldi, at vit í felagnum hava fingið nógv av skafti.

Í februar fylti Diabetesfelagið 40 ár. Tað er ein stórur merkisdagur. Í fjøruti ár hava eldsálir arbeitt fyri at betra um korini hjá fólki við diabetes í Føroyum. Tað arbeiðið byggja vit víðari á, og tað er ein heiður at sleppa at standa á odda fyri felagnum júst nú.

Ein av stóru uppgávunum í ár hevur verið at gera okkara skipanir og samskifti meira talgild. Hetta ger arbeiðið smidligari og styrkir sambandið við limirnar. Tað er kanska ikki tað mest sjónliga arbeiðið, men tað er eitt týðandi grundarlag fyri eitt nútímans felag.

Vit hava eisini fingið eitt gott samstarv við danska diabetesfelagið. Tað merkir, at limir okkara nú fáa ókeypis limaskap í teirra felag og kunnu nýta fleiri av teimum tilboðum, sum tey bjóða – til dømis diabeteslegur, bæði fyri barnafamiljur og ung, ráðgeving og talgilda útgávu av Diabetesblaðnum. Hetta er eisini ein partur av okkara arbeiði at gera felagið meira talgilt. Tað er tó ein long tilgongd, og vit eru ikki heilt komin á mál enn. Men vit vóna, at hetta skjótt fer at virka.

Vit hava eisini gott samstarv við Steno-miðstøðina. Saman hava vit havt fundir um arbeiði við kunningartilfari og skipað fyri tiltøkum. Hetta samstarv hevur eydnast væl, og vit ætla at halda fram við tí.

Altjóða hava vit eisini verið umboðað. Vit luttóku á Nordic Forum í Finnlandi saman við øðrum norðurlondum, og á aðalfundi hjá altjóða diabetesfelagnum IDF í Tailandi. Har helt fyrrverandi forkvinnan í Diabetesfelagnum, May-Britt Skoradal, fyrilestur um gransking sína í typu 2 diabetes og fótbóltsvenjing. Eisini sendu vit eitt umboð til ráðstevnuna Type2Gether í Brüssel.

Eisini her heima hava vit skipað fyri tiltøkum.
Í august høvdu vit eitt barnatiltak, har familjur savnaðust til ein hugnaligan dag. Nøkur foreldur greiddu frá sínum upplivingum við at hava barn við diabetes, og ein sálarfrøðingur hevði fyrilestur um familjulívið, tá ein kronisk sjúka kemur inn í familjuna.

Í sambandi við Altjóða diabetesdagin í november skipaðu vit saman við Steno-miðstøðini fyri einum tiltaki í Smæruni. Har greiddu May-Britt Skoradal, lektari í heilsuvísindum og granskari, og Herborg L. Johannesen, endokrinologur, frá gransking og viðgerð innan diabetes.

Vit hava ikki havt eitt virkið ungdómsfelag seinastu tíðina, men arbeiði er nú farið í gongd at fáa eina ungdómsnevnd virka aftur. Tað gleðir meg nógv, tí ung eiga eisini at hava eina sterka rødd í felagnum.

Í september varð eisini ein serligur grunnur stovnaður: **Grunnurin eftir Kaj og Annu Nolsøe til frama fyri gransking í sukursjúku.** Tá Kaj og Anna Nolsøe fóru, stóð í teirra testamenti, at alt búgvið skuldi latast til ein grunn at stuðla gransking í diabetes. Í tí sambandi varð eisini skipað fyri loppumarknaði á Sandi í november, har allur peningurin fór óskerdur til grunnin. Hetta er ein stór og virðilig gáva til gransking í Føroyum, og vit eru teimum sera takksom fyri hesa gávu.

Vit hava eisini sett eitt miðlafólk í starv, Ingolf S. Olsen, sum fer at styrkja okkara sjónligheit. Sum tað fyrsta fer hann at viðgera evni og tilfar at leggja afturat kjakinum um Wegovy og Ozempic eftir íkomnu støðuna, tá generelli stuðulin til Ozempic brádliga varð tikin burtur. Ein hin fremsta uppgávan hjá miðlafólkinum verður at virka fyri, at røddin hjá fólki við diabetes eisini verður hoyrd í almenna kjakinum.

Í nevndini hava vit havt eitt gott samstarv. Í ár hava vit havt 11 nevndarfundir umframt nógv regluligt samskifti.

Í nevndini eru Grímur Kamban Mortensen, næstformaður, Allan Skaalum, skrivari, Mourits Joensen, kassameistari, og Terji á Lakjuni, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Brynhild Thomsen og Bára Joensen.

Eg vil takka nevndini fyri gott samstarv og stórt arbeiði gjøgnum árið. Eisini vil eg takka Terja fyri hansara drúgvu tænastu í nevndini og Grími, sum tíverri ikki fær hildið fram í nevndini á hesum sinni. Íkastini frá teimum báðum hava verið bæði stór og virðismikil.

Sum forkvinna síggi eg eitt felag við sterkum rótum og stórum møguleikum. Hetta fyrsta árið hevur eisini staðfest fyri mær, hvussu nógv vit kunnu fáa til vega, tá vit arbeiða saman.

**Takk fyri**

**Lea Sofía Skaalum**